# Høvuðsstaðurin eigur ungdómin

**Havnar Róðrarfelag vann tvær kappingar millum 5-mannafør, og Argja Róðrarfelag, sum í fjør stóð seg ógvuliga væl, vann fyri fyrstu ferð í ár**




*Eisini í dreingjaróðrinum var bátur úr høvuðsstaðnum fremst. Men her var kappingin frá Fípuni Føgru sera hørð, áðrenn teir á Sílinum høvdu vissað sær sigurin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

5-MANNAFØR

*Jóannes Hansen*

Tað er í høvuðsstaðnum, at áhugin fyri kappróðri er størstur. Í hvussu so er um roknað verður út frá áhuganum at taka lut.

Leygardagin vóru tað bátar, sum venja á Havnarvág, sum vunnu allar kappingarnar í 5-mannaførum. Sílið, sum vann í Klaksvík, endurvann sigurin í kappingini millum 5-mannafør við kvinnum. Á Norðoyastevnu var Drekin nummar tvey og Blikur nummar trý. Hesa ferð var Blikur nummar tvey, meðan Fípan Fagra og Frúgvin fóru framum Drekan.

Í Klaksvík var Sílið tvær bátslongdir frammanfyri Drekan. Hesa ferð var Sílið eina bátslongd frammanfyri Blik.

Genturnar umborð á Bliki kiksaðu á Norðoyastevnu. Tær endaðu á fjórða plássinum og vórðu næstaftastar. Ta ferðina vann Drekin, og Tjaldrið var næstfremst. Hesa ferð gekk øðrvísi. Blikur var nógv fyrstur á mál. Tær vóru hálva aðru bátslongd frammanfyri Drekan. Í fjør vann Argja Róðrarfelag tríggjar av seks FM kappingum. Sigurin hjá Blika gentunum í Hósvík var tann fyrsti hjá felagnum í ár.

- Vit hingu fastar í startinum í Klaksvík. Tí gekst tað minni væl hjá okkum ta ferðina. Hesa ferð komu vit væl frá startinum, og so royndist tað væl betri, staðfestu fegnu Blika genturnar.

Í kappingini millum 5-mannaførini við dreingjum er spenningurin so stórur, sum tað ber til at vera. Ritan vann í Klaksvík. Sílið vann í Hósvík. Í báðum kappingunum var Fípan Fagra í Klaksvík næstfremst.

Sigurin hjá Sílinum á Fípuni Føgru var meiri sannførandi enn sigurin hjá Rituni var á Norðoyastevnu. Men tað eru so smáir marginalir, sum talan er um, at alt er púra opið.

**Úrslitini**

**5-mannafør, dreingir**

| | |
|---|---|
| 1 Sílið | 04:57.07 |
| 2 Fípan Fagra | 04:58.18 |
| 3 Ritan | 05:00.04 |
| 4 Drekin | 05:02.04 |
| 5 Blikur | 05:05.23 |
| 6 Tjaldrið | 05:06.11 |
| 7 Tekla | 05:12.09 |
| 8 Dúgvan | 05:28.07 |

‘

**5-mannafør, gentir**

| | |
|---|---|
| 1 Blikur | 05:20.03 |
| 2 Drekin | 05:25.07 |
| 3 Tjaldrið | 05:30.01 |
| 4 Tekla | 05:33.21 |
| 5 Erla Kongsdóttir | 05:54.11 |

**5-mannafør, kvinnur**

| | |
|---|---|
| 1 Sílið | 05:14.08 |
| 2 Blikur | 05:17.22 |
| 3 Fípan Fagra | 05:19.15 |
| 4 Frúgvin | 05:19.22 |
| 5 Drekin | 05:20.13 |
| 6 Firvaldur | 05:20.17 |
| 7 Royndin Fríða | 05:23.16 |
| 8 Junkarin | 05:28.09 |
| 9 Ritan | 05:28.13 |
| 10 Ørnin | 05:29.12 |
| 11 Falkur | 05:40.02 |

*Hjá gentumanningunum vóru fimm bátar tilmeldaðir hesaferð. Blikur vann ein tryggan sigur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*




*Sílið var nógv tann fremsti báturin hjá eldru gentubátunum. Hálvt fjórða sekund undan Bliki á øðrum plássinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

